ALUPLAST
Dygdin liggur í royndunum . . .
Heimasíða: www.aluplast.fo - Tlf.nr.: 47 5555 - Fax: 47 5556

Aluplast byrjaði í 1973 at framleiða vindeygu og hurðar úr plast. Í dag framleiða vit eisini fasadur og havastovur úr bæði plast og aluminium.

Herumframt framleiða vit rottangar, føroyskar bátar, brunnar, kør, tangar og annað úr glastrevju.

Eisini hava vit serkønt fólk til uppseting og viðlíkahald av okkara vørum umframt hurða-automatik frá Tormax Dørautomatik.

FÁI EITT ÓBINDANDI TILBOÐ HJÁ OKKUM!











# Góðu gestir – vælkomin á vitjan í Runavík!



**Bústevnan, Hús og Innbúgv 2003**

BÚSTEVNAN
*Rodmundur Nielsen, borgarstjóri*

Tá ið várið er í hondum, og dalar og líðir grønkast, fær tað okkum øll at gera okkum til reiðar at taka ímóti summarinum.

Fólk, ið ætla sær at seta føtur undir egið borð við at byggja sær egnan bústað, eru vanliga sera virkin um várið.

Ein vitjan á bústevnuni 2003, sum verður komandi vikuskiftið í ítróttarhøllini í Runavík, er staðið, har vit eiga at fáa ein nýggjan íblástur.

Tað, at vit kunnu møtast til eina slíka stevnu her um okkara leiðir, er at fegnast um.

Nógv byggivirksemi hevur verið seinastu árini, og er tað tí av stórum týdningi, at teir, ið bjóða seg fram innan byggivinnuna við ymiskum tænastuvinnum, kunnu koma saman til eina slíka bústevnu.

Teir, ið hava fyriskipað, hava lagt dent á at skapa góðar karmar.

Vit fegnast um góðu undirtøkuna, sum bústevnan í Runavík hevur fingið - at fyritøkur úr øllum landinum og innan øll økir í byggivinnuni hava valt at luttaka.

Tað skal vera okkara ynski, at bústevnan fer at eydnast væl, bæði hjá tykkum, sum sýna fram og ikki minst hjá tykkum mongu, sum vónandi koma á vitjan.

Eg fari vegna Runavíkar býráð at bjóða øllum hjartaliga vælkomin á Bústevnuna 2003 í Runavík.

*Rodmundur Nielsen, borgarstjóri*

# Málið at hava allar tættir við er rokkið

**- Fleiri framsýnarar leggja dent á tað nýggja, sum rørir seg innan hús og innbúgv, siga fyrireikararnir**

BÚSTEVNAN
*Vilmund Jacobsen*



*Tað eru teir báðir, Hans Petur Ellingsgaard og Dánial Petur Hansen, sum eru stigtakarar til bústevnuna, sum verður í Runavík um vikuskiftið.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Stigtakarar til bústevnuna, Hús og Innbúgv í Runavík, sum verður hetta vikuskiftið, eru Hans Petur Ellingsgaard og Dánial Petur Hansen.

Báðir eru samdir um, at málið hjá teimum, sum var at hava allar tættir innan hús og innbúgv við á bústevnuni, er rokkið.

- Á stevnuni verða framsýnarar, sum selja timbur, køkar, baðirúm, vindeygu, tak, tún og flísar, hita og sanitet, el-instalatiónir, elútbúnað og gardinur - fyri at nevna nøkur dømi úr rúgvuni. Aftrat hesum verða eitt nú fíggingarstovnar og tryggingarfeløg.

## Øll vælkomin

Dánial Petur og Hans Petur siga, at bústevnan er fyri øll, sum hugsa um bygging, umbygging ella umvælingar av sethúsum - og eisini fyri tey, sum leita eftir hugskotum innan hetta økið.

- Fleiri framsýnarar leggja eisini dent á tað nýggja, sum rørir seg innan hús og innbúgv, og hesin parturin er ikki minst áhugaverdur á eini slíkari stevnu sum hesari, siga fyrireikararnir, sum vænta at síggja nógv fólk í Runavíkar kommunu um vikuskiftið.

Hetta er fyrstu ferð, at bústevnan fer av bakkastokki, men ætlanin hjá Dánial Peturi Hansen og Hans Peturi Ellingsgaard er ikki, at hetta verður seinastu ferð.

- Vit vóna, at hetta verður byrjanin til eina afturvendandi stevnu, tí vit ivast onga løtu í, at her er ein tørvur, sum ikki er nøktaður, siga teir báðir.